## DAGSINS MEINING

# Kapping í luftini

So kom tað loksins. Nýggja føroyska flogfelagið, ið fer at taka kappingina upp við hitt føroyska flogfelagið, Atlantsflog. Við stovnanini av FaroeJet hava vit nú brádliga tvey føroysk flogfeløg, sum skulu kappast um at veita tænastur á rutunum millum Føroyar og útlandið.

Mong høvdu annars væntað, at tað fór at verða eitt útlendskt felag, sum legði seg út í kappingina. Tann møguleikin er so enn til staðar. Men kann endin gerast, at tá tað longu eru tvey feløg á rutuni, tá útlendsk feløg frítt kunnu flúgva uppá Føroyar frá 2007, tá er ikki pláss fyri einum aftrat?

Tað er ikki sørt ein feril av lagnunnar speisemi, nú Atlantsflog endaði í somu støðu sum „erkafíggindin" Mærsk hevði alla ta fyrstu tíðina á Føroyarutuni, nevniliga eini monopolstøðu. Tað var ein kærkomin stórhending, tá monopolið hjá Mærsk varð brotið og kapping kom. Føroyska flogfelagið varð sera væl móttikið, og kappingin hevði eisini við sær, at tænastan bleiv betri. Endin varð so, at danska flogfelagið gav skarvin yvir, tí kappingarneytin fekk so stóra undirtøku. Og endin varð tann, at vit fóru aftur til byrjanina - við einum flogfelag.

Føroyingar tóku Atlantsflog til sín sum sítt egna barn, tá tað syrgdi fyri at bróta monopolið. Men hvør kundi vitað, at hetta skuldi enda við, at vit ístaðin fyri eitt danskt monopol fingu eitt føroyskt monopol! Hetta er so ikki nakað, sum vit kunnu lasta Atlantsflog fyri, tí gongdin á marknaðinum lagaði hetta so.

Síðani Atlantsflog einsamalt fór at reka ruturnar millum Føroyar og útlandið hava røddir verið frammi um, at tænastan aftur er versnað. Nakað, sum næstan sigur seg sjálvt, tá eingin kappingarneyti er at sammeta seg við og kappast við. Atlantsflog hevur tó ment seg nógv sum flogfelag út frá stóru avbjóðingunum, sum hava verið, bæði tá Mærsk var á marknaðinum, og nú tað hevur verið einsamalt. Men einki stendur í stað. Broytingar og nýggjar avbjóðingar eru partur av allari samfelagstilgongdini, eisini á flogøkinum.

Nú er so fyrsti kappingarneytin komin á banan, og hann er føroyskur. Vit bjóða FaroeJet vælkomnum og vóna, at vit við hesum útviklingi fáa eina sunna og góða kapping, har tað verður pláss fyri báðum teimum føroysku flogfeløgunum. Um tað hevði verið betri fyri brúkaran við einum stórum útlendskum kappingarneyta skulu vit ikki gera okkum klók uppá. FaroeJet er so komið á banan, og um tað er komið fyri at verða, vil tíðin vísa. Og tíðin fer eisini at vísa, um hesi bæði føroysku flogfeløgini við tíðini fara at fáa kapping úr útlandinum eisini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Berghol til Dals/Undirsjóvartunnil

**Gerhard Lognberg**
*Løgtingsmaður*



Eg má siga, at eg hvakk ikki sørt, tá ið eg hoyrdi andstøðutingmannin Páll á Reynatúgvu sleppa at flekja seg út í Útvarpi Føroya og geva sær alla æru av, at nú verður byrjað at bora til Dals.

Eg ringdi til Útvarp Føroya og spurdi, hvussu hesin maður sleppur í útvarpið at gera reklamu fyri sær sjálvum.

Ja, at senda fundarboð ígjøgnum Kringvarpið »live«. T. d »eg fari enn einaferð at royna at fáa hinar bygdirnar til fundar«. Hetta ger hann ígjøgnum útvarpið.

Hesa reklamu kann eg ikki nýta. Ein sending var við mær tíðliga ein morgunin. Hon bleiv tikin av aftur skránni um kvøldið. Hví, ja hví?

Eg kann gera vart við, at hvørt tað einasta eitt uppskot sum andstøðan kom við, bleiv fallið.

Tað var Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin, sum sjálvandi hava arbeitt fyri, at Sandoyggin gjørdi eitt gott hál, og eg sjálvur sum samgongulimur og sjálvsagt eisini hava koyrt minni hugalig uppskot ígjøgnum.

Vit fingu 7 mió.kr. til Dals, 5 mió.kr. til undirsjóvartunnil. Stuðulin til flutning av skúlabørnum og hækkað peningin til infrakervið til útoyggjar. Pening til at fáa »Teistan« í sjúkraflutningssigling aftur. Buss til heimini í Sandoynni, og nógv annað sum er Sandoynni at gagni.

Til síðst ein heilsan til Kringvarpið. Eg má siga, sum ein ávísur tingmaður plagar at siga: Eg eri sjokeraður. Ja, eg er sjokeraður av okkara gamla útvarpið, sum eg altíð havi havt virðing fyri, men tíðanverri nú fer at skorta.

Tað er einki løgið í, at andstøðan tekur undir við samgonguni, tá samgongan kemur við so skilagóðum stigum at bora til Dals og undirsjóvartunnil til Sandoynna v. m.

At Útvarpið velur at geva andstøðuni heiður fyri slíkar stórar ætlanir, tað luktar av partapolitikki frá Útvarpsins síðu.

Annars takk til alt tingfólkið. Tit atkvøddu fyri øllum sum var Sandoynni og Sandoyar Valdømi til gagns.

P.S. Tað er samgongan, sum skal taka tað súra við tí søta. Andstøðan kann so velja at atkvøða við ella atkvøða ímóti.

# Jólamálrøkt

**Eyðun á Borg**
*Á Borg á Argjum stytsta dag 2005*



**Ikki:** desember, jólafrokostur, fýrfatsljós, rísingreytur, frosturin og í líka máta,

**men:** desembur, jólaborð-(hald), bikarljós, rísgreytur, frostið og somuleiðis/á sama hátt!

Desembur er betri, føroysk ending. Harumframt skriva vit ikki mai (mei?) við j, og mars hevur ikki t á føroyskum!

Frokostur hoyrir ikki heima í føroyskum. Da/fø orðabókin sigur, at frokost merkir morgunmatur. Jólaborðhald er um kvøldið, so nátturði hevði helst hóskað betur, men hví ikki bara siga jólaborð(hald), sum orðabókin eisini sigur!?

Bikarljós hoyrdi eg onkran siga. Eitt ljós í einum bikari. Frálíkt orð. Burtur við fýrfatsljósinum!

Takk, somuleiðis ella á sama hátt! Í líka máta gevur onga meining!

Rísgreytur, ikki rísingreytur. Rís er hvørkikynsorð og kann ikki fáa in-ending!

Frostið (tað) og ikki frosturin (hann). Frostið, tað bítur!

Gleðilig jól!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1ð27
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 3ðmm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.